## Størv

# Manning til Ternuna I

Hervið verða tvey størv sum stýrimaður, eitt starv sum maskinmeistari og eitt sum dekkari lýst leys at seta innan Strandfaraskip Landsins frá 1. apríl 2001.
Viðkomandi skulu byrja umborð á Ternuni I, men skulu til eina og hvørja tíð kunna verða fluttir umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins, sum fyriskipað av leiðsluni. Stýrimennirnir skulu kunna avloysa skiparan.

### Arbeiðsuppgávurnar umborð

Høvuðsuppgávan hjá Strandfaraskipum Landsins er at nøkta landsins tørv á fólka- og farmaflutningi. Hetta verður gjørt eftir fastlagdari ferðaætlan og annars verður skipað fyri serflutningi við ferðafólki kring oyggjarnar.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.
Farleiðin hjá Ternuni I er Strendur-Toftir-Tórshavn, og siglt verður tríggjar túrar dagliga frá mánadegi til fríggjadag. Arbeiðstíðin er í miðal 42 tímar um vikuna.
Leygardag og sunnudag er eingin sigling.
Við Ternuni I eru skipari, tveir stýrimenn, maskinmeistari og ein dekkari.
Skipið liggur á Strondum um náttina, og umstøður eru at búgva umborð.

### Størvini fevna um

Manningin á strandfaraskipunum skal verða við til at tilrættaleggja ein effektivan dagligan rakstur, og at tryggja at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.
Manningin skal eisini verða við til at:

- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja at skipið verður lasta í samsvari við altjóða krøv
- Meta um viðlíkahaldstørvin umborð
- Seta upp mannagongdir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking
- Samstarva við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

### Førleikakrøv

*Umsøkjarar til stýrimann:*

- Vinnubræv sum stýrimaður á 4. stigi
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri ennn 3 ár
- Prógv í GMDSS

Umsøkjarar til maskinmeistara:

- Vinnubræv sum skipsmaskinistur

*Umsøkjarar til dekkara:*

- Vinnubræv sum ófulltikin matrósur
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri ennn 3 ár

*Annars rokna vit við, at tú hevur:*

- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Roykkavari/sløkkileiðari ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleiki til formlig krøv og royndir viðvíkjandi rakstri av ferðamannaskipum
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Álítandi og góðan røkjuskap

### Setanartreytir

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 20. februar 2001, kl. 12.00

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara, tlf. 343000 ella e-mail: pah@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika. Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Umsóknir um stuðul til verkætlanir

Norrønt Atlantssamstarv (NORA) er stovnur undir Norðurðurlanda Ráðharraráðnum, ið hevur til endamáls at menna og stuðla samstarvi á Norrønu Atlantsleiðini millum Grønland, Føroyar, Ísland og Noreg og grannaøkini hjá hesum londum. Serligur dentur verður lagdur á at uppskotini til verkætlanir koma frá vinnufyritøkunum sjálvum og at sambond vera skapt millum vinnufyritøkur og tey granskingar- og menningar-umhvørvi, sum eru í NORA londunum

Verkætlanir sum fremja samstarv, menning og gransking, sum stuðla vinnulívinum á Atlantsleiðini, verða raðfestar ovast. Dentur verður eisini lagdur á at verkætlanirnar eru nýskapandi og hava flest møgulig av londunum við í samstarvunum Stuðul kann veitast til verkætlanir har privat vinnuvirki og stovnar og almennir stovnar og granskingarstovnar samstarva.

Stuðul kann veitast í mesta lagi 3 ár og er treytaður av at onnur fígging fæst til verkætlanina.

Umsókn, skrivað á norðurlendskum máli, eigur at fevna um:

- Stutt yvirlit yvir sjálva ætlanina
- Upphæddina, ið søkt verður um
- Heildarfíggjarætlan, ið vísir, hvørjir stovnar ella einstaklingar taka lut í útreiðslunum og hvussu fígging fæst til vega
- Upplýsing um fíggjarligu viðurskiftini hjá umsøkjarunum og møguleikarnar fyri at megna sín part av fíggingini

Navn/nøvn á ábyrgdarfólki fyri sjálva verkætlanina

Meira fæst at vita við at venda sær til Norrønt Atlantssamstarv ella við at vitja heimasíðu okkara http: www.nora.fo

Stuðulsumsóknir skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2001.

Umsóknir verða sendar til:

**NORRØNT ATLANTSSAMSTARV**
Bryggjubakki 12 · Postboks 259 · 110 Tórshavn
telefon: 314028 · telefax: 310459
e-mail: nora@nora.fo · heimasíða: www.nora.fo





GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo



Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA


**Fiskimálastýrið**
*Sjóvinnufyrisitingin*

# Sjóvinnubrøv

Sjóvinnufyrisitingin boðar frá, at tey sjóvinnubrøv, sum geva rættindi sum yvirmaður umborð á einum handilsskipi í altjóða sigling, skulu **í seinasta lagi 1. februar 2002** vera skift út til tey sokallaðu STCW-95 sjóvinnubrøv.

Treytirnar fyri at fáa tey nýggju sjóvinnubrøvini eru:

**Navigatørar:**

- prógv fyri loknað útbúgving á sjómansskúla
- siglingarbók ella aðra váttan um siglingartíð við handilsskipum
- galdandi heilsuprógv fyri sjófólk
- GMDSS-GOC ella ROC-prógv
- passmynd
- navigatørar, ið hava staðið skipara- ella stýrimansprógv áðrenn 1991, skulu harafturat hava lokið skeið í vandamilkum farmi
- ARPA-simulatorskeið

**Maskinmeistarar:**

- prógv fyri loknað útbúgving á maskinmeistaraskúla
- siglingarbók ella aðra váttan um maskintænastu umborð á fiski- ella handilsskipum
- galdandi heilsuprógv fyri sjófólk
- passmynd

**GMDSS-Radioprógv til nýtslu umborð á handilsskipum í altjóða sigling:**

- galdandi GMDSS-GOC ella GMDSS-ROC prógv frá Radioeftirlitinum
- galdandi heilsuprógv
- passmynd

Teir navigatørar, sum *ikki* hava staðið radarsimulatorskeið ARPA, fáa árit um, at sjóvinnubrævið ikki gevur rættindi umborð á skipum, sum hava hesa útgerð.

Viðkomandi má persónliga møta upp eftir nýggja sjóvinnubrævinum fyri samstundis at undirskriva hetta.

Roknast má við einari ávísari avgreiðslutíð og verður tí heitt á teir persónar, sum hetta viðvíkur, um at fáa skift tey gomlu sjóvinnubrøvini út sum skjótast.

**Kravt verður ikki, at teir persónar, sum sigla við fiskiskipum, skulu umbýta síni sjóvinnubrøv.**

Víst verður annars til kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk.

*Tórshavn tann 1. februar 2001*

**Sjóvinnufyrisitingin**
Yviri við Strond 19
100 Tórshavn


veitst tú ikki tað?
Sosialurin


TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Sosialráðgevi

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir sosialráðgeva til sosialu deild.

Umframt eitt fast hálvtíðarstarv er eisini eitt hálvtíðarfraloyvisstarv óvissa tíð leyst at søkja.

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur m.a. tey málsøki, sum sambært galdandi almannalóggávu eru løgd til kommununa at umsita.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum**
hjá sosialráðgevanum verða sambært barnaforsorgarlógini at ráðgeva børnum og familjum við trupulleikum og skipa fyri fyribyrgjandi tiltøkum sambært avgerð barnaverndarinnar. Deildin leggur stóran dent á tvørfakligt samstarv, og kemur sosialráðgevin at hava tætt samstarv við aðrar fakbólkar.

**Førleikakrøv**
Grundleggjandi og avgerandi er, at umsøkjarin hevur góð samstarvsevnir og áhuga at arbeiða við børnum og familjum við trupulleikum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við nógvum fjølbroyttum og mennandi uppgávum við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. februar 2001. Viðmerk á umsóknina "Sosialráðgevi".

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi, at arbeiða 40 tímar um vikuna, til Miðstovnin í Gundadali.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har ítróttur og náttúran hava stóran leiklut í gerandisdegnum.

Børnini eru í aldrinum 5-11 ár, ein sera áhugaverdur bólkur at arbeiða við.

**Vit ynskja**
at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og vera førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum, og at tær dámar at vera úti saman við børnunum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett tann 1. mars 2001 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara, tlf. 31 60 42, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. februar 2001.

SNARSKIVAN

# Frá Fuglafjarðar Arbeiðskvinnufelag

Ársaðalfundur felagsins verður á Muntra 24.02.

Skrá samb. lóg felagsins.

**Nevndin**


Bjargingarútgerð til skip og bátar

- Bjargingarbátar
- Yvirlivilsisdraktir
- Flótidraktir
- Flótdraktir
- Bjargingarvestir
- Bjargingar kransar
- Neyðrakettir
- Hondbluss

Sosialurin - 311820
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli • Tel. 315600 • Fax 318008